# LØGTINGSLÓG NR. 58 FRÁ 9. JUNI 2008 UM FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

**Løgtingslóg nr. 58 frá 09.06.2008**


- Kapittul 1 Virkisøki
- Kapittul 2 Uppgávur
- Kapittul 3 Útbúgvingar
- Kapittul 4 Bygnaður
- Kapittul 5 Fíggjarviðurskifti
- Kapittul 6 Ymiskar ásetingar
- Kapittul 7 Skiftisreglur
- Kapittul 8 Gildiskoma


Nr. 58 9. juni 2008

**(**University of Faroe Islands**)**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**Kapittul 1**
**Virkisøki**

**§ 1.** Lógin er galdandi fyri Fróðskaparsetur Føroya (University of Faroe Islands).
*Stk. 2.* Fróðskaparsetur Føroya er almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini, har hetta er ásett í hesi lóg.
*Stk.3.* Fróðskaparsetur Føroya, Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya og Føroya Læraraskúli verða lagdir saman undir navninum Fróðskaparsetur Føroya.

**Kapittul 2**
**Uppgávur**

**§ 2.** Uppgáva Fróðskaparsetur Føroya er at inna gransking og veita frálæru sambært § 3. Endamálið er at grunda alla frálæru á gransking og veita frálæru á hægsta altjóða stigi. Stovnurin skal tryggja samanhang millum gransking og útbúgving og tryggja samfelagsligar raðfestingar og fyrilit í hesum sambandi. Raðfestingarnar av uppgávunum skulu støðugt eftirmetast. Stovnurin skal breiða út kunnleika og eggja til orðaskifti um vísindalig háttaløg, ástøði og úrslit.
*Stk. 2.* Uppgávurnar verða røktar innan teir karmar, ið eru ásettir í hesi lógini, í lógum, sum skipa útbúgvingar og uppgávur hjá stovninum nærri, ella í kunngerðum, ásettum við heimild í hesum lógum. Fróðskaparsetur Føroya hevur granskingarfrælsi. Stovnurin hevur skyldu til at verja hetta frælsið, eins og stovnurin skal verja vísindaliga siðalæru.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann ikki geva Fróðskaparsetri Føroya tænastuboð viðvíkjandi teimum uppgávum, ið eru fevndar av hesi grein.

**Kapittul 3**
**Útbúgvingar**

**§ 3.** Neyvari reglur um útbúgving á Fróðskaparsetri Føroya verða ásettar í løgtingslóg. Um nærri reglur um ávísa útbúgving ikki eru ásettar í løgtingslóg, skulu slíkar reglur ásetast í kunngerð.
*Stk. 2.* Fróðskaparsetur Føroya skal støðugt endurmeta raðfestingarnar av útbúgvingum og gera uppskot um, hvørji útbúgvingartilboð skulu vera á hvørjum fakøki.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin viðger uppskot sambært stk. 2 og skipar fyri eftirmeting av stovni og útbúgvingum sum grundarlag fyri møguligum tillagingum í kørmunum sambært stk. 1. Eftirmetingar verða gjørdar av uttanlands serfrøðingum og fara fram fjórða hvørt ár.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta felags reglur fyri útbúgvingarnar á Fróðskaparsetri Føroya, herundir um námsstig, løggilding og góðskumeting. Reglurnar kunnu eisini fevna um tær útbúgvingar, sum eru skipaðar við løgtingslóg.

**§ 4.** Fróðskaparsetur Føroya kann bjóða hesar fulltíðarútbúgvingar:

1) Bachelorútbúgving, sum telur 180 ECTS námsstig.
2) Bachelorútbúgving, ið er yrkisrættað, sum telur upp til 240 ECTS námsstig.
3) Masterútbúgving, sum telur 120 ECTS námsstig.
4) Ph.D.-útbúgving, sum telur 180 ECTS námsstig.

*Stk. 2.* Eitt fulltíðar lestrarár samsvarar við 60 ECTS námsstig.
*Stk. 3* Námsstigini verða tillagað soleiðis at tey til ein og hvørja tíð eru í samsvari við altjóða ásetingar. Broytt námsstig verða ásett í kunngerð, sbr. § 3, stk. 4.

**§ 5.** Fróðskaparsetur Føroya kann loyva lesandi at taka partar av útbúgving á útlendskum lærustovni.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur fyri útbúgving sambært stk. 1. og fyri útskriving av prógvi í hesum sambandi.

**§ 6.** Fróðskaparsetur Føroya kann bjóða ískoytisútbúgvingar, parttíðarútbúgvingar og eftirútbúgvingar eftir reglum, ið landsstýrismaðurin ásetir eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya.
*Stk. 2.* Fróðskaparsetur Føroya kann bjóða parttíðarútbúgvingar, ið kunnu vera partar av góðkendum fulltíðarútbúgvingum á stovninum.

**§ 7.** Fróðskaparsetur Føroya skipar fyri lestrarvegleiðing, vegleiðing um útbúgvingarviðurskifti, skiftislesnaði og yrkismøguleikum fyri tey lesandi.

## Kapittul 4
## Bygnaður

**§ 8.** Fróðskaparsetur Føroya verður stjórnað av einum stýri.
*Stk. 2.* Rektari leiðir Fróðskaparsetur Føroya innan karmar, sum stýrið ásetir.

*Stýrið*

**§ 9**. Í stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya eru sjey limir. Landsstýrismaðurin tilnevnir sjey stýrislimir og sjey varalimir fyri 4 ár í senn, tó so at studentaumboð verður tilnevnt fyri eitt ár í senn.

*Stk. 2.* Stýrislimir og varalimir verða tilnevndir soleiðis: Fýra limir og fýra varalimir verða tilnevndir uttaneftir eftir landsstýrismansins avgerð. Tveir stýrislimir og tveir varalimir verða tilnevndir eftir tilmæli frá starvsfólkunum í føstum starvi á Fróðskaparsetri Føroya. Ein stýrislimur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá teimum lesandi.
*Stk. 3.* Limirnir uttaneftir skulu hava universitetsútbúgving ella førleika á samsvarandi stigi. Teir skulu til samans hava holla vitan um og gott innlit í universitetsútbúgving og gransking. Tilnevndu limirnir skulu til samans hava leiðsluroyndir frá vinnu og umsiting.
*Stk. 4.* Stýrið velur formann og næstformann millum teir av landsstýrismanninum uttaneftir tilnevndu stýrislimir.
*Stk. 5.* Varalimur tekur sæti í stýrinum, um vanligum limi berst frá.

**§ 10.** Landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur um, hvussu tilmæli av umboðum fyri starvsfólk og lesandi á Fróðskaparsetri Føroya fer fram, sbrt. § 9, stk. 2.
*Stk. 2.* Samsýning til stýrislimir skal góðkennast av landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

**§ 11.** Stýrið er evsti myndugleiki á stovninum og hevur ábygdina av virksemi stovnsins mótvegis landsstýrismanninum. Stýrið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av, at ásetingarnar í lógini og øðrum fyriskipanum um virksemi stovnsins verða fylgdar.
*Stk. 2.* Stýrið tekur sær av áhugamálunum hjá Fróðskaparsetri Føroya sum útbúgvingar- og granskingarstovni, ásetir bygnað og tekur avgerð um langtíðarvirksemi og menning.
*Stk. 3.* Stýrið skal fyrisita tilfeingi Fróðskaparsetursins soleiðis, at tað gagnar endamáli stovnsins á besta hátt.
*Stk. 4.* Fíggjarætlan Fróðskaparsetursins verður send landsstýrismanninum til góðkenningar.
*Stk. 5.* Stýrið ger starvsskipan fyri virksemið hjá Fróðskaparsetri Føroya, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna.

**§ 12**. Um stýrið á ólógligan hátt setir framtíð stovnsins í vanda, og sýtir boðum at fáa viðurskiftini í rættlag, kann landsstýrismaðurin áleggja stýrinum at leggja frá sær og í hesum sambandi útnevna eitt fyribils stýri, til nýtt stýri er sett.

**§ 13.** Neyvari reglur um vísindastarvsetanir og starvsloysn verða ásettar í starvsskipanini.
*Stk. 2.* Stýrið setir og loysir úr starvi rektara. Stýrið setir og loysir úr starvi dekanar og fyrisitingarstjóra eftir tilmæli frá rektara.
*Stk. 3.* Stýrið hevur ikki heimild at taka avgerð í einstaklingsmálum um studentar ella onnur starvsfólk enn tey, ið eru nevnd í § 13, stk. 2.

*Rektari v.m.*

**§ 14.** Rektari hevur dagligu leiðsluna av Fróðskaparsetri Føroya innan teir karmar, sum stýrið hevur ásett. Dekanar og fyrisitingarstjóri røkja sínar uppgávur við heimild frá rektaranum.
*Stk. 2.* Rektari skal hava royndir av leiðslu og kunnleika um granskingarumhvørvi, skal hava royndir og innlit í útbúgvingarøkið og hava skil fyri samspælið millum stovnin og samfelagið sum heild.
*Stk. 3.* Rektari setir og loysir úr starvi starvsfólk á Fróðskaparsetri Føroya, sbr. tó § 13, stk. 2, 2. pkt.

**§ 15.** Dekanur skal vera granskari á viðkomandi granskingarøki og hava royndir og innlit í universitetsútbúgvingar, gransking, leiðslu og samanspælið millum stovnin og samfelagið sum

heild.
*Stk. 2.* Stýrið setir ein av dekanunum sum vararektara eftir tilmæli frá rektaranum.

*Megindeildir o.a.*

**§ 16.** Gransking fer fram á megindeildum, deplum og granskingarkjarnum, ið eru knýttar at Fróðskaparsetri Føroya. Undirvísing fer fram í eindum undir megindeildum, sum stýrið góðkennir eftir tilmæli rektarans.
*Stk. 2.* Dekanur hevur leiðsluna av megindeild, tryggjar samanhang millum gransking og útbúgving og dygdina í útbúgvingum og undirvísing.
*Stk. 3.* Dekanur hevur vísandi til rektaran ábyrgdina av, at øll gransking, undirvísing og annað virksemi á megindeild, eind v.m. fer fram sambært reglum og málum, sum Fróðskaparsetur Føroya hevur sett sær.

**§ 17.** Til tess at tryggja dygdina í útbúgving og undirvísing, setur dekanur lestrarráð eftir tørvi.
*Stk. 2.* Stýrið ásetir í starvskipan eftir tilmæli frá rektara neyvari reglur fyri skipan, uppgávur og virksemi hjá lestrarráði.
*Stk. 3.* Í hvørjum lestrarráði er sama tal av vísindaligum starvsfólkum og studentum, ið verða vald av ávikavist vísindaligum starvsfólkum og studentum.
*Stk. 4.* Lestrarráð velja formann millum vísindaligu umboðini og næstformann millum studentaumboðini.

**§ 18.** Til tess at ráðgeva rektara og stýri, verður heimilað rektara at seta akademiskt ráð. Stýrið ásetir valreglur og starvsskipan eftir tilmæli frá rektara.

## Kapittul 5
## Fíggjarviðurskifti

**§ 19.** Fróðskaparsetur Føroya verður fíggjað við játtan á løgtingsfíggjarlógini.
*Stk. 2* . Fróðskaparsetur Føroya kann hava inntøkufíggjað virksemi og taka móti stuðli frá øðrum. Tílíkur stuðul má ikki ávirka verandi yvirskipaðu útbúgvingar- og granskingarætlanirnar

## Kapittul 6
## Ymiskar ásetingar

**§ 20**. Landsstýrismaðurin kann gera av, at Fróðskaparsetur Føroya skal hava felags fyrisitingarligar skipanir við aðrar stovnar.

## Kapittul 7
## Skiftisreglur

**§ 21.** Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta í kunngerð aðrar skiftisreglur eitt nú um viðurskifti hjá studentum, sum eru farnir undir lestur fyri 1. august 2008.
*Stk. 2*. Rektari sbrt. § 13, stk. 2, 1. pkt. verður settur fyrstu ferð 1. oktober 2008.
*Stk. 3*. Rektararnir á Føroya Læraraskúla og Føroya Sjúkrarøktarfrøðiskúla verða fakleiðarar fyri ávikavist læraraútbúgvingina og sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina á Fróðskaparsetri Føroya, við somu lønartreytum restina av setanarskeiðum teirra.

**Kapittul 8**
**Gildiskoma**

**§ 22**. Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2008. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 65 frá 21.05.1987 um Fróðskaparsetur Føroya, Universitas Færoensis, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 84 frá 13. juni 1995.

Tórshavn, 9. juni 2008

**Jóannes Eidesgaard (sign.)**

løgmaður

/ Kristina Háfoss (sign.)

Lm. nr. 156/2007